# EYSTUROYAR DANSIFELAG

# Dansiveturin 2019/20

**Dagbók, hvat vit kvøða o.t.**
Aftur í ár fara vit at føra dagbók, soleiðis at tað sæst, hvat vit í Eysturoyar dansifelag fáast við og kvøða. Skrivarin. jd.

**19-10.2018, fyrsta dansikvøld á vetrinum. 29 fólk.**
Vit byrjaðu nýtt kvæðaár treyst í huga.
Hin føroyski dansurin, Ivan formaður,
Torkilsdøtur, Kathrina,
Væl komnir føroyingar her í vási, Joen Carl,
Kaffiprát, har Ivan greiddi frá um komandi vetur - ikki minst um, at felagið fór at halda 50-ára føðingardag sín í bygdarhúsinum í Leirvík.
Jeg ser så mangt et orlogsskib, Anfinnur.

**25-10-2019, annað dansikvøld á vetrinum. 42 fólk (27 frá okkum, 15 frá Ung í dansi).**
Hetta gjørdist eitt heilt gott dansikvøld, tí vit eldru lívgaðust upp av hesum káta ungdómi, ið kvað av hjartans lyst.

Sigmundskvæði yngra, (við trimum løgum), Kristian Jacobsen,
So vakrar moyggjar, Leon Johannesen,
Herr Zinklar, Brestir Bj. Restorff,
Kópakvæði, Kathrina.
*Kaffi og prát.*
Flóvin Bænadiktsson, Leon,
Føroyingar, sum her nú koma saman, Jónleif Johannesen,
Skomageren fra Bø, Kristian,
Gudbrandskvæði, Jónleif,
Kjartan Ólavsson, Kristian,
Veðratátturin, Ólavur Syderbø,
Jeg lagde mit hoved til Elverhøj, Kristian,
Stolt Signhild, Rebekka Syderbø,
Her nógv er at gera, Jónleif,
Illamannatáttur, nýggjur táttur, yrktur í Álandi í summar, Leon.

**02-11-2019. Dansifelagið helt sín 50-ára føðingardag í Bygdarhúsinum í Leirvík.** Vit høvdu boðið Sumbiar dansifelag, Skúvoyar fornminnafelag, Stígum fast

í Dali, Leikum fagurt á Sandi og umboð fyri Landsdansifelagið. Umboð fyri 6 kommunur vóru eisini boðin, og av teimum tóku trý av: Nes kommuna, Runavíkar kommuna og Eysturkommuna. Gestirnir til samans blivu 84, og frá okkara felag vóru vit 81, **so alt í alt vóru vit 165 fólk.**

Hafburd konge, Joen Carl,
Ragnhildsvísa (Der hersked en konge), Jónleif Johannesen,
Bøhmerlandsdronningen, Karstin í Húsinum,
Frísarnir í Akrabyrgi, Gunnar Poulsen,
Dvørgamoy, Louis Houmann,
Herr Zinklar, dalbingar,
Engang det sig nu hændte, Kristian Jacobsen,
Kópakvæði, Hendrik Egholm,
Mallebro, ?
Sigmundsvísa, Gunnar Poulsen,
Tá eg verði stórur, David Nattestad,
Veðratátturin, Karstin í Húsinum,
Norska løva, Kathrina Hansen,
Torkilsdøtur, Gunnar Restorff,
Vågen, ?
Sniolvstáttur, Anfinnur Huusgaard,
Brestiskvæði, Jónleif Johannesen,
Vatntátturin, Kristian Evaldsson,
Kjartan Ólavsson, Kristian Jacobsen.

**08-11-2019, fjórða dansikvøld á vetrinum: brúðarvísur. 31 fólk**
Hetta kvøld kvøða vit ymiskt, sum verður kvøðið til brúðardans, og vit royna at finna ymiskar skiparar hvørt ár. Tey bæði fyrstu vóru upphiting.

Í Gøtu ein dag, Kristian,
Bóndatátturin úr Suðuroy, Jóannes,
Leivskvæði, Anfinnur Huusgaard,
Fisken tager sin føde i vand, Kristian,
Várharra hann segði, Jóannes.
*Kaffisteðgur*.
Harra Pætur og Elinborg, Kathrina,
Bøhmerlandsdronningen, Jóna,
Kong Hans han sidder på Kjøbenhavn, Joen Carl.

**15-11-2019, fimta kvøld á vetrinum: táttakvøld, har vit kvøða styttri og lættari. 38 fólk.**

Ved Kristianssand, Jóannes og Andras,
Burtur á heiði, Anna,
Kall og Svein ungi, Jón Rói,
Áttamannafarið, Jens,
Ríma úr Funningsfirði, Bjørg,
Ole Morske, Leivur,
Tað hevur tókt millum føroyingar gaman, Anfinnur,
Nykursvísa, Jón Rói,
Vælkomnir føroyingar her í vási, Joen Carl.
*Kaffisteðgur. Kunning um Ribar-ferð.*
Nú gerast kvøldini myrk og long, Sanna,
Der går dans på Ribergade, Leivur,
Ungersvend bad sin flikke, Jóna,
Landbukkutátturin, Hans,
Vit fáa tevatn og breyð, Annfinnur,
Í Gøtu ein dag, Jón Rói,
Sambandsfall, Joen Carl,
Hvørjum man tykja vakurt hjá sær, Jens,
Løgd eru tún á gøtum sløttum. Jens.

**22-11-2019, sætta kvøld á vetrinum, barnadansur. 50 børn, ca. 25 avvarandi.**
Besta undirtøka í fleiri ár: úr skúlum her á leið, barnabørn hjá fólki í felagnum osfr. Vit høvdu keypt 50 sunkist og twigs, sum skuldi verið ivaleyst, men einki leyp av. Vit gloymdu at bjóða teim vaksnu kaffi, men tað fáa tey næstu ferð.
Veturin kom/Burtur á heiði,
Sigmundskvæði yngra, eini 20 ørindir, Kristian,
Øskudólkur og sópingarkona,
Nykursvísa. Jón Rói,
Nú liggur ein kavafonn tindi á,
Lítla Elsa fekk frá mammu síni eina dukku.
*Sunkist og twigs.*
Ormurin langi, 15 ørindir, Jón Rói,
Lítli Snar, við eykaørindi, Tóta,
Kongaríkið í Babylon,
Eg kendi mær ein ríkmann, Jón Rói.

**Tey vaksnu, ca. 20 fólk.**
Spanialand og Myklagård, 25 ørindir, Hans. (Vit leggja okkum eftir lagnum úr Funningi).
Sambandsfall, Joen Carl,
Jeg lagde mit hoved til Elverhøj, Bjørg,
Runsivalsstríðið, ca. 30 ør. Leivur,
*Kaffisteðgur.*
Jóannes Dj. hevði lovað at siga nakað um frísarnar í Akrabergi, men av tí at einki er at siga um teir, vildi hann heldur siga okkurt um Erlend bisp, hann sum doyði í Bergen, og neyvan við Múrin í Kirkjubø. Alt hatta um frísarnar er uppspunni, segði Jóannes, Tað var úr eini  sokallaðari 'kopibók', sum Dr. Jakobsen hevði funnið fram. Jóanes er fróðarmaður, og vit sótu sum undir lestri.

So kvóðu vit **Frísarnar á Akrabergi**, sum Pól F. yrkti til silvurbrúdleypið hjá Albert Djurhuus, vitapassara á Akrabergi. Hetta kvæði kvóðu vit við sumbingarlag.

Frísavísa, Kristian. Hetta er ein vísa, sum verður brúkt til okkurt dansispæl – sum Kristian dugir.

**29-11-2019, sjeynda kvøld á vetrinum. 17 fólk.**
Ormurin langi, 30 ørindir, Jón Rói,
Grindavísan, 20 ørindir, Gert í Húsinum,
Bakvenda vísa, Kristian,
Finnbogaríma, Anfinnur.
*Kaffiprát.*
Stærke Tidrik, Leivur,
Jónsvíkingar, Hans,
God nat og farvel. Kristian.

Viðmerkingar: Við 17 fólkum fæst góður dansur, og tá er lætt at læra seg við at lurta, og tað gjørdu vit. Bakvendu vísu hava vit ikki hoyrt í okkara felag fyrr. Hon er so skemtilig, at skiparin fekk láturkrampa.
Báðir teir fyrstu skipararnir eru bara um 15 ára gamlir, men teir smæddust ikki burtur, so tað er hugaligt. Ein genta, eitt sindur eldri enn hesir báðir, hevur skipað tvær ferðir í vetur, so vit gleðast stórliga. Og ikki at forgloyma Kristian, sum eisini er ein ungdómur - og ger nógv um seg í føroyskum dansi. jd.

**06-12-2019, áttanda kvøld á vetrinum, okkara strandakvøld. 33 fólk**
Vit byrjaðu barnadansin kl. 20, men børnini vóru ikki nógv: kundu teljast á einari hond. Tey, sum vóru, kvóðu allan tíman á tamb, dugdu at kvøða og fylgdu væl við.

Ein drongur var við, heilt til vit góvust út móti midnátt. Ein annar drongur hevði eitt ynski: hann vildi hoyra Regin smið, og tað fekk hann. Kristian tók eini 10-12 ørindir, og hesin lítli var væl nøgdur, og tað vóru vit vaksnu eisini. Øll gleddu seg til Lítla Snar, tí tey vistu, at eykaørindið fór at koma við, og tað kom tað eisini. Barnadansurin endaði við "Eg eri jólamaðurin". Sjálvandi fingu børnini sunkist og twigs 😉

Flóvin Bænadiktsson, Elin,
Rottujól (Mús på korn), Jóannes,
Ribold han er en grevesøn, eini 10-12 ørindir, Kristian,
Her nógv er at gera, Joen Carl,
Har bylgjan leikar, Joen Carl,
Stolt Signhild, Elin,
O, kan du ikke mindes, Andras og Sanna.
*Kaffiprát.*
Frísavísa, Kristian,
Ólavur Riddararós, Jóannes,
Hvørjum man tykjast vakurt hjá sær, Jens,
Ungersvend bad sin flikke, Kristian,
Alpurósan, Kára og Sanna,
Føroyingar, sum her nú koma saman, Joen Carl,
Tað hevur tókt millum føroyingar gaman, Anfinnur,
Vind op, vind op i rå, Elin,
God nat og farvel, Kristian.

Eini 8 fólk uttan fyri felagið vóru í dansi, og tað eru vit glað fyri. Lagið var gott, og nógv prátað.

Nú halda vit advent og lata jólini fara afturum. Vit síggjast aftur í Hæddini nýggjárskvøld kl. 20.30. Tá hava vit ein kaffimunn og smákakur. Vit vaksnu plaga at gjalda kr. 50,- í part sum stuðul til felagið hetta kvøld.

**01-01-2020, dagbókin níggjunda kvøld á vetrinum**, okkara fyrra almenna dansikvøld á vetrinum, AVLÝST fyri veður.

**10-01-2020, dagbókin tíggjanda kvøld á vetrinum,** í Glyvr'Hanusarhúsi AVLÝST fyri veður.

**17-01-2020, dagbókin ellivta kvøld á vetrinum** í Glyvr'Hanusarhúsi (broyting í skránni).

Byrjaðu kl. 20.00 við barnadansi, sum gøtufólk skipa fyri. **10 børn og ca 10 vaxin**. Kvóðu tað vanliga, men Jón Rói tók okkurt extra 🙂:) Hugnaligt við góðum stemningi.

**Kl. 21.00, tey vaksnu**, men fleiri børn og teirra blivu eftir eina góða løtu. 45 fólk.
Her nógv er at gera, Kristian,
Gøtuskeggjar, frá 71. ørindi, Andras og Hans,
Ved Kristiansand, Karstin,
*Signhild og dvørgurin, Kristian,
Leirvíks Páll, Kathrina., Leivur.
*Kaffisteðgur og prát.*
**Runsivalsstríðið, fyrsti triðingur, Leivur,
Spanialand og Myklagård, Hans,
God nat og farvel, Kristian og Andras,
Eitt leygarkvøld á Grynnuni, Ivan,
Gubbi og eg, Jón Rói,
Harpuríma, Anna og Sanna.

Viðmerkingar: * "Signhild og dvørgin" dugdu bara skiparin og Kári. Góð vísa, sum verður tikin fram aftur.
**Vit høvdu vitjan úr Frankaríki, so Rólant jall og Karlamagnus blivu markeraðir.

**24-01-2020, dagbókin, tólvta kvøld á vetrinum: aðalfundur.** 38 fólk á aðalfundi, 43 fólk í dansi.
Dia Ellindsson stýrdi fundinum, sum bleiv avgreiddur fyri kaffisteðgin. Formaðurin gav frágreiðing um gongdina tað farna árið, og tað sama gjørdi okkara umboð í Sláið Ring. Reiðinskapurin gjøgnumgingin og góðkendur.
Í nevndina komu Jens og Ivan (afturvaldir); eykalimir: Marita Poulsen (afturvald) og Jóannes Djurhuus (nývaldur); Sláið Ring: Kathrina, og Karstin y, eykaumboð (afturvald); grannskoðari: Beinta (nývald). Anna Sørensen heldur fram sum kassameistari.

Dvørgamoy, Louis,
Fípan fagra, fyrra helvt, Kathrina,
Snekken ligger på landet, Sjúrður,
Det er i nat en vågenat, Kristian,
Brúsajøkil, tveir triðingar, Hans og Kathrina.

**28-01-2020, dagbókin, í Vesturstovu, eldrabýlinum í Fuglafirði.**

Hetta týskvøldi vóru vit biðin at koma at kvøða við og fyri teimum gomlu. it vóru 13 fólk, og kvøldið gjørdist hugnaligt, ikki minst av, at fleiri komu uppí, meðan onnur sótu og kvóðu við.

**31-01-2020, dagbókin trettanda kvøld á vetrinum, til Haraldssunds.** Eini 80 fólk, harav gott og væl **30 úr okkara felag**.

Felagið leigaði buss frá Hæddini, og hann steðgaði á leiðini, har fólk skuldu við. Tað blivu 18 fólk. Onnur komu á egnum hjólum.
Hetta kvøldið kvóðu vit:
Leivs kvæði, Jónleif, Klaksvíkar dansifelag,
Ribolt er en grevesøn, Kristian, Eysturoyar dansifelag,
Gudbrandskvæði, Jónleif, Kd,
Stærke Tidrik, Asbjørn Lómaklett, Kd,
Dvørgamoy, Leivur Jacobsen og Kristian, Kd og Eyd,
Sinklar, Dávur, vágamaður,
Brestiskvæði, Jóannes Dj., Eyd,
*Nátturði*
Sigmundskvæði yngra, Ólavur, Ung í dansi,
Vågen, Leivur, Kd,
Jmsvíkingakvæði, Símun, Tøkum lætt,
Fípan fagra, Leivur, Kd,
Guttormsvísa, Jóannes í Dali, Stígum fast,
Dovrafjall, Kári Sverrisson,
Rúdusarvísa, Símun, Tl,
Engang det sig nu hændte, Kristian, Eyd,
Torkilsdøtur, Annika, Kd,
Jákupsa skegg, Ólavur, ung í dansi.

**05-02-2020, dagbókin, á Eysturoyar røktar- og ellisheimi. Ca. 22 fólk.**
Tað gjørdist eitt gott og hugnaligt dansikvøld við stórum blíðskapi

Har hittu vit okkara elsta lim, Annu Thomsen úr Saltangara Hon fyllir 96 í dag, og sjálvandi ynsktu vit henni til lukku. Anna orkar ikki at kvøða longur, men hon er heiðurslimur í okkara felag.

**07-02-2020, dagbókin fjúrtanda kvøld á vetrinum.** Fyrri partur: barnadansur. **50 børn, eini 30 foreldur/avvarandi.**
Vit kvóðu tað lætta klassiska stoffið, men eisini úr tí tyngra: úr Brestiskvæði og Orminum langa. Meir enn helvtina skipaðu børn sjálvi. Ein genta var so kedd av, at

Sigmundskvæð yngra var gloymt, at tað tóku vit fyrst í vaxnamannadansinum (ein fjórðing).

**Seinni partur: tey vaksnu. 40 fólk.**

Sigmundskvæði yngra, fyrsti fjórðingur, Kári,
Sinklar, Elin,
Tað, sum vendi niður, vendir upp, Jón Rói,
Harra Pætur og Elinborg, Kári,
Frísarnir, Jóannes,
Hjalmar og Hulda, Leon, Ung í dansi,
Ormurin Langi, seinna helvt, Jóannes,
Sniolvstáttur, Anfinnur,
Gubbi og eg, Jón Rói,
God nat og farvel, Kristian.

Tað eru fá, sum duga Frísarnar væl enn, men tað er við at koma. Serligt var tað, at Jóannes fekk góðan stuðul frá einum sumbingi, so tað gjørdist rættur mergjaður sumbingadansur, og tað var stuttligt.

Eisini fingu vit ta stóru æru at fáa vitjan av nøkrum úr "Ung í dansi", og ein av teimum tók vísuna um Hjalmar og Huldu, og har dugdu vit væl at kvøða við. Tað gjørdist rættiliga hátíðarligt.

**13-02-2020, dagbókin, í Gøtubrá, eldrabýlinum í Norðragøtu.**

Eini 12-14-fólk frá okkum og fleiri børn frá barnadansinum í Glyvr'Hanusarhúsi. Kvóðu smátt og stórt: Burtur á heiði/Veturin kom, Ormin langa, Tá eg verði stórur osfr. Eitt hugnaligt kvøld við nógvum práti aftur við drekkamunninum.

Vit takka fyri stóran blíðskap.

**14-02-2020, dagbókin fimtanda kvøld á vetrinum. 40 fólk.**

Síðsta vanliga dansikvøld á vetrinum, sum ikki bleiv heilt vanligt. Dagin fyri ringdi telefoniin hjá formanninum, og tað var ein norsk kvinna, ið spurdi, um hon saman við nøkrum vinfólkum kundu sleppa í føroyskan dans hjá okkum. Tað var sjálvandi leyst og liðugt alt fyri eitt.

Jón Rói var byrjaður uppá Flóvan Bænadiktsson, táið tey komu. Ivan fór tá og lærdi tey, hvussu mann heldur hendurnar í føroyskum dansi - og stiðið. Tey komu so uppí, og tey vóru við alt kvøldið. Stig dugdu tey væl, sum ikki kann undra, tí tvær vóru professionellir dansarar.

Í kaffiløtuni bleiv nógv prátað. Tey fáast við dans, modernaðan, og tey vóru komin higar at fáa inspiratión til eitt projekt. At tey funnu okkum, var bara tí, at okkara formaður tók telefonina, táið tey ringdu.

Tað kann ikki undrað, at vit fóru at kvøða okkurt, sum hevur við Noreg at gera so ella so, og tað dámdi teimum væl. Men Sinklar kendu tey ikki, vóru ikki av Romsdals-leiðini, har Zinklar man vera mest kendur. Sama ger: tey kendu bæði Sverra og Ólav Trygvason.

Vit kvóðu:
Flóvin Bænadiktsson, Jón Rói,
Vågen, Ivan,
Góðan morgun ketta mín (Noregs menn), Jón Rói,
Hin føroyski dansurin, Ivan,
*Kaffiprát*
Ormurin langi, fyrsta triðing, Jón Rói,
Der går dans på Ribergade, Ivan og Hans,
Nú liggur ein kavafonn tindi á, Ingrid,
Nordan for Trondhjem, Dia,
Blakman konge, Hans,
Sinklar, Hans,
Pottatáttur, Ivan,
Veðratátturin, Jón Rói.

### 15-02-2020, Dagbókin, barnadansistevna í Miðvági

Á kvæðaferð í Miðvági.
Hetta var ein góður dagur, tí vit fóru eini 40 fólk til Miðvágs á barnadansistevnu, sum Vága dansifelag og Sláið Ring skipaðu fyri. Hjá mær er hetta 11. ár rað - ofta við fleiri børnum við mær, men nú er tað bara av gomlum vana, mann er við - saman við barnadansinum í Gøtu, sum okkara felag hevur við at gera.

Hóast veðrið var ringt - ódnarveður - kom øll rúgvan: úr Sumba, Sandoynni, Klaksvík osfr. eini 450 fólk tilsamans. Ein stórur partur kenningar frá øðrum árum.

Blíðskapurin var stórur: fingu góðan morgunmat og døgurða, og drekkamunn við kakum, frukt og øllum góðum.

Útferðirnar í grannalagnum máttu sloyfast fyri veður. Í staðin fóru vit í ovaru hædd á bygdarhúsinum og fingu góðar frágreiðingar um Mikkjal á Ryggi, kvæðaskald, og um

skúlan í Miðvági. Miðvágur hevur elsta bygdaskúla í Føroyum, heilt frá 1830-unum. Ikki smávegis. Tað vóru Edvard og Hildur, sum greiddu frá, og tað gjørdu tey væl og hugtakandi.

Tað bleiv kvøðið nógv, og dansurin gekk væl, léttur og stuttligur. Stuttar vísur og longri kvæðir ella kvæðabrot í góðum skifti.

Endin var, at Elin og Hervør, systrarnar báðar, kvóðu Mær gav santa Mortan, og tá vóru vit bara eini 10-15 fólk eftir. Táið vit skuldu taka Stat op santa Simeon, var formaðurin í Vága dansifelag har og rak okkum í bussin, men tá var klokkan 15.

Tað, sum gleðir meg mest, er, at tað vóru tey ungu og børnini, ið skipaðu tað mesta. Og so tað, at nú duga øll stig. Soleiðis var ikki fyrr.

Í okkara felag kunnu vit gleðast um, at vit eiga tríggjar ungar kvæðakempur. Tær tvær longu vælkendar, og tann triðja legði í vaðið hendan dansiveturin, yngsti limur í felagnum. Hann gjørdi nógv um seg í Miðvági!

Sum onkuntíð fyrr steðgaðu vit á við Sjógv í Kollafirði og kvóðu 15 ørindir av Orminum langa, nett á tí stað, har hetta kvæði er yrkt fyri smáum 200 árum síðani. Jón Rói skipaði.

Ps.
Nú kann onkur halda, at veðrið var so keðiligt. Tað var tað, men dansurin bleiv betri av veðrinum, tí vit vóru øll har, sum vit skuldu vera: mitt í dansinum :)

Stóra takk, Vága dansifelag og Sláið ring, fyri ein rimmardag!
jd.

### 17-02-2020. Dagbókin, í Tofta skúla

Sum so mangan fyrr vóru vit boðin ein fyrrapart at kvøða saman við næmingunum. Hetta var eina viku fyri fastalávint.
Fyrst við teimum smærru børnunum, so ein matarsteðg, og síðani við teimum størru: frá 5. til 10.flokk. Sum sítt serliga høvdu onkrir eldri flokkar Kópakvæði, sum biður seta á seg, tá tað ikki er kent í forvegin.
Á skúlanum hava tey havt skipaða kvøðing nú í nógv ár, og tað sæst aftur - og hoyrist! Stig duga øll, og tey eru uppi í alla tíðina. Meginpartin skipaðu tey sjálvi.
Vit 13 - meginparturin veteranar eftirhondini - takka fyri løtuna.

**21-02-2020, Dagbókin sekstanda kvøld á vetrinum.** Okkara hugnakvøld. 68 fólk.

Hugnakvøldið hava vit vanliga fríggjakvøldið fyri fastalávint, og limirnir tekna seg, og hesaferð vóru vit 68 fólk, sum er tað mesta í fleiri ár.
Vit byrjaðu við vælkomstsnapsi Einar's. So var borðald, við Jóannesi sum sjefi, og tað kláraði hann til ug. Vit syngja vanliga úr Føroya fólks, men hesaferð var tað úr sangheftinum til 50-ára føðingardagin hjá felagnum.
Ivan formaður hevði góðar hugleiðingar um kvøðing og dans sum heild. Louis hevur altíð eitt innslag, í ár var tað yrkingin "Deyðastund Tróndar" hjá Hans Andriasi, sum okkara maður í Oyndarfirði sang við síni málmrødd.
Lutaseðlar verða seldir sum stuðul til felagið, og tí stóðu Sunneva og Kathrina fyri. Lutirnir vóru so gott sum allir gávur frá limum.
So at kvøða. Felagið fer í summar kvæðaferð til Ribe, og tað avgjørdi tær fyrstu vísurnar.

Der går dans på Ribergade, Ivan,
Streingirs vísa, Anfinnur,
Bøhmerlandsdronningen, Jóna,
Grindavísan Høgni,
Magnus Heinason, Jón Rói,
Ved Kristiansand, Jóannes,
Fótbóltstátturin, Karstin,
Vit fáa tevatn og breyð, Jón Rói,
Melis æt ein drongur, Ivan,
Har bylgjan leikar, Høgni,
Stolt Signhild, Jón Rói,
Heimalambið, Sanna,
Góðan morgun ketta mín (Noregs menn).

Nú var klokkan farin av 1, og fólk takkaðu fyri seg. Ein góðan tíma seinni var húsið sum avblást.

**24-02-2020, Dagbókin, itjaðu á Miðnámi á Kambsdali, 9 fólk.**

Annað ár, sum vit hava verið og hjálpt við kvøðing á Kambsdali. Tað var nógv fólk í Auluni, og dansurin gekk væl. Vit kvóðu bæði lætt og stutt. Fyri at nevna nøkur:
Burtur á heiði/Veturin kom,
Øskudólkur og sópingarkona,
Brestiskvæði,
Regin smiður,
Lítla Elsa,

Torkilsdøtur,
Stat op Santa Simeon,
Bjerget ligger langt ud' i skoven.

Hetta var ein hugnaligur fyrrapartur við góðum lívligum dansi. Vit høvdu kenslu av at gera góða nyttu. Blíðskapurin aftaná var stórur.

**24-02-2020, Dagbókin, seytjanda kvøld á vetrinum: fastalávint.**

Øll tey ár hava vit havt almennan dans fastalávints mánadag. Undirtøkan hevur verið misjøvn, men ongantíð stór. Vit lata kr. 50,- fyri at koma inn - øll vaxin, limir ella ikki.
Í ár høvdu vit tríggjar skuffukakur, og ikki eina, til drekkamunnin, tí vit høvdu frætt, at raskasta dansifelag í landinum kom í dans. Tey sviku ikki, so vit vóru heili 67 fólk tilsamans, og dansurin var hareftir.

(Magnus Heinason, Jón Rói, Ey.)
---------------------------------------
Flóvin Bænadiktsson, Jón Rói, Ey,
Tá eg verði stórur, Høgni, Ey,
Brókatáttur, Ólavur, Tøkum Lætt,
Leivur Øssursson, Óli á Geilini, TL,
?, Andrias, TL,
Dvørgamoy, Louis, Ey,
Brúsajøkil, Róar, TL
Veðratátturin, Jón Rói, Ey,
Dengang jeg drog afsted, Erlendur, TL,
Rottujól - Mús pá korn, Jóannes, Ey,
Jólini tald: Mær gav Santa Mortan, Joen Carl, Ey,
Stat op Santa Simeon,
Bjerget ligger langt ud' i skoven.
Blakman konge, Hans, Ey.

So endaði Jóannes Djurhuus dansiveturin við tí edlu skilnaðarvísuni hjá Hans David Matras: **"God nat og farvel"**. H.M. Matras yrkti vísuna í 1851, har hann takkar øllum - eisini Gudi - fyri ein góðan dansivetur á Viðareiði. Sama ár giftist hann og flutti til Fugloyar.
https://eystdans.dk/wp-content/uploads/Kvaerdir/GodnatFarvel.pdf

*Gott vár og summar, øll somul.*
*Fyri nevndina*
*Skrivarin*